# Ólavsøkukonsertin er f

**Ólavsøkukonsertin 2005 var ein roynd. Konsertin, sum plagdi at vera Føroya størsta tónleikatiltak, royndi at endurnýggja seg. Men royndin miseydnaðist so illa, at man kann tosa um eina samleikakreppu**

ÓLAVSØKUKONSERTIN
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tónleikaupplivingarnar vóru nógvar og góðar, summar enntá heilt góðar, men í tí lítið hugnaliga Kommunuskúlagarðinum standandi á hørðum svørtum asfalti, tyktust fleiri av bólkunum fullkomiliga feilbookaðir.

Ólavsøkukonsertin og kanska í stóran mun sjálv ólavsøkan er eitt ball. Fólk koma fyri at drekka seg full, syngja, dansa og hoppa til tónleik. Hetta er ikki ein lurtikonsert, tað var týðiligast, tá Deja Vu við eini góðari framførslu av droymandi og sveimandi tónleiki næstan tømdu Kommunuskúlagarðin. Men eisini tann annars sera góða framførslan hjá Go Go Blues var stórt sæð uttan samband við áhoyrararnar, tað var ikki fyrr enn í allar seinasta lagnum, at Go Go ordiliga fingu fatur í áhoyrarunum. Tim Christensen var tann einasti, sum spældi fyri einum rættiliga fullum garði, men eisini hetta virkaði galið, stórir partar av áhoyrarunum lurtaðu ikki. Hetta hóast Tim og bólkurin vóru fantastiska góðir. Har var ikki tann veitslan, sum plagar at vera, fólk balladust sjálvt um tónleikur var, ikki við tónleikinum.

### Vandamikið trýst

Beint áðrenn Tim fór á pallin, vóru nógvir fløskuhálsar, tí so nógv fólk royndi at

## Og so kókaði tað



Lama Sea er ein fantastiskur bólkur. Tá eg lurtaði eftir teimum á Ólavsøkukonsertini slóg tankin meg "Hava Lama Sea eingi miðal hampa løg". Øll løgini vóru hamrandi góð. Teir løgdu fyri við "Fitta sanginum", og eg var seldur í somu løtu, eisini hini løgini hjá bólkinum, sum "Everything I touch turns into gold" "He kicked my ass" og "Woody Allen" eru so ræðuliga fangandi og glað, at eg longu gleði meg til eina fløgu frá bólkinum. Teir tolkaðu eisini løgini "Take me on" hjá Franz Ferdinand og "You really got me" hjá The Kinks, og fingu løgini at ljóða, sum teirra egnu.

Teir eru Føroya glaðasti bólkur og tað smittar, eg hevði elskað at sæð Lama Sea seinni á konsertini við fleiri áhoyrarum. Tí sjálvt við so fáum áhoyrarum kókaði frammanfyri pallin.

## Og so rýmdi fólkið



Deja Vu vóru uttan iva tann minst hóskandi bólkurin, sum spældi á Ólavsøkukonsertini. Framførslan var góð, teir spældu ordiliga væl, og tann sveimandi melodiski popp rokkurin var í støðum frálíkur. Serliga tað fyrsta lagið, tað sera Pink Floyd kenda "Confused", var gott. Men framførslan rapaði saman í "The River", sum slettis ikki riggaði. Hetta tømdi kommunuskúlagarðin. Hóast fleiri av hinum løgunum hjá bólkinum eisini vóru góð, var sambandi við áskoðararnar einki. Deja Vu egnar seg væl í intimari karmum, men á Ólavsøkukonsertini megnaði bólkurin slettis ikki uppgávuna.

## Føroya Meistarar

Go Go Blues vunnu luttøkuna á Ólavsøkukonsertini í Prix Føroyar. Teir eru allir framúrskarandi tónleikarar, Bólkurin er Føroya meistari í tónleiki, Rógvi er Føroya meistari í trummum, Arnold er Føroya meistari í bassi, og saman vunnu teir Prix Føroyar. Veika liðið Uni, er einki veikt lið. Sjálvt um hann ikki er Føroya meistari í gittari ella sangi, so er hann ein fínur gittarleikari og sangari, sum dryppar av blues. Teir spældu eina ordiliga góða konsert, sum hevði fingið fólk at trampa við í bluesklubbum kring allan heim. Men á Ólavsøkukonsertini tyktist bólkur eitt sindur feilbookaður. Tað var ikki fyrr enn dú dú dú lagið "I'm gone" at ordiligt lív kom í. Men tá var eisini fyrsta ordiliga hoppiveitslan á konsertini.



## Ikki so tendraður punkur

Føroya virknasti bólkur eitur Paradox. Teir tríggir ungu popp punkararnir hava spælt á hvørjum tanga seinastu tíðina, og hava á onkran hátt eisini megnað at spælt eina fløgu inn. Teir eru blaðungir, spæla ordiliga væl, og eru langt síðan vorðnir tannáringa idol í Føroyum. Løgini eru fín og fangandi, og tann unga røddin á sangaranum gevur popp punkinum eina ungan dám, sum klæðir honum. Tað er fantastiskt at hoyra ein blaðungan drong syngja "The innocense of childhood never dies". Tað sagt, so var Ólavsøkukonsertin nokk tann ringasta konsertin, eg havi sæð við Paradox. Teir tyktust ikki so tendraðir, sum oftað fyrr. Tann stóri pallurin gjørdi fjarstøðuna millum tónleikararnar dekan ov stóra, og hetta darvaði teir.

## Harðligu Synarchy

Synarchy vunnu Pop Top konsertina, byrjaðu tí Ólavsøkukonsertina. Synarchy var sum ein ljóðmúrur við trummum, bassi, tveimum gittarum, ljómborðum og sangara. Tónleikurin var næstan symfonisktkendur tungmálmur við einum trummihelviti undir og sera vøkrum melodilinjum oman á, bornar av eini góðari orkumiklari songrødd. Sjálvt í teimum friðarligu pettunum minti trummuleikarin okkum á, at vit ikki skuldu slappa av, við dupultpedaltrummisløgum, sum ljóðaðu, sum maskinbyrsur í millum køldu betong-veggirnar.

Hetta var ein ordiliga spennandi bólkur, sum umframt at ljóða væl sá hamrandi væl út. Klæðini vóru gjøgnumførd, og tónleikararnir headbangaðu og livdu og andaðu tungmálm á pallinum. Hetta var hvørki lurtaravinarligt ella pent, men harðligt og næstan djevilskt uppá tann feita mátan. Tá Synarchy spældi, var lítið av fólki komið á konsert, men teirra trúgvu áhoyrarar stóðu fremst og headbangaðu.



## Á, tey deilig

Gentubólkurin Poppkorn spældi e
meðan ljóðfólkið hjá Tim Christen
eitt sindur óruddiligt. Tónleikurin e
lutvíst live. Tær spældu trý løg: "Ge
vælframleitt og fangandi poplag, s
og Nalja løgini "Sjeikurin" og "Á, ta
og tær hava ment seg nógv. Lillian
á einum palli. Men á Ólavsøkukons
betri. Tær hava vant við dansivenja
eitt sindur ov fimleikakend, og kur